

Jákup Símun Simonsen
*Býráðslimur fyri Tjóðveldi*

# Ágangurin á høvuðsstaðin heldur fram - nú stóð Vinnuháskúlin fyri tørni!

Seinastu árini hevur verið ein harður ágangur frá sitandi landsstýri á høvuðsstaðin. Í berari politiskari ómegd hevur tað verið eitt aðalmál at niðurlaga virksemi í høvuðsstaði Føroya, og flyta stovnar út um landið fyrilitaleyst.

Havi í blaðgreinum ávarað í móti og heitt á politkarar um at steðga hesum.

Seinastu árini eru vælvirkandi stovnar fluttir úr høvuðsstaðnum, m.a.

- **Skipaeftirlitið flutt til Vágarnar**
- **Strandferðslan flutt til Suðuroyar**
- **Barsilskipanin flutt til Suðuroyar**
- **Brúkaraumboðsmaðurin fluttur til Suðuroyar**
- **Havnar sjúkrakassi fluttur til Klaksvíkar**

Hettar hevur kostað skattaborgarunum 10-tals milliónir í flytingum, umskipanum og øðrum.

Nú stendur Vinnuháskúlin fyri tørni, og skal tæðast sundur og flytast til Klaksvíkar. Hettar verður gjørt í móti fakligari niðurstøðu og uttan nakra haldgóða grundgeving.

Øll, ið kenna til Føroya søgu, vita hvat skúlarnir Føroya sjómansskúli og Maskinmeistarskúlin – nú Vinnuháskúlin - hava avrikað og ment okkum sum tjóð. Í yvir hundrað ár hevur skúlin virkað og ment seg í høvuðsstaðnum. Hesir skúlar eru víðagitnir um allan heim fyri dugnaskap, og eru næmingar eftirspurdir frá hesum skúlum víða um heim.

Við at sundurbýta hendan skúlan í partar, verður tað eitt tap fyri næmingarnar og lestrarumhvørvið sum heild. Tað, sum kann henda, er at næmingar velja at taka sína útbúgving uttanlands ístaðin, og tá hava øll tapt og mist.

Hvar eru løgtingslimirnir, sum búgva í Suðurstreymoy, nú Vinnuháskúlin í Tórshavn verður niðurlagdur og fluttur til Klaksvíkar?

Tað, sum sermerkir hesar flytingar, er at tað er Javnaðarflokkurin, sum gongur á odda. Eg fari tí eisini at heita á borgarstjóran í Tórshavnar kommunu, Heðin Mortensen, um at lata seg í arbeiðsklæðini og fara til arbeiðis innanfloks í Javnaðarflokkinum fyri at steðga hesi ørvitisætlan. Lat tað vera tey røttu arbeiðsklæðini, tí nú er nóg mikið av tíðindaskrivum, móttøkum og myndum. Nú mugu vit síggja verulig úrslit, ið koma høvuðsstaðnum tilgóðar.

---

Sjúrður Rasmussen

# Latið lógaruppskotið um málráð sodna

*Mentamálaráðið hevur á heimasíðu síni latið almenninginum til ummælis eitt uppskot til løgtingslóg um málráð. Sum ein av teimum mongu í almenninginum, havi eg hug at gera hesar viðmerkingar:*

Johs. V. Jensen hevur sagt tey víðagitnu orðini, at málið er sum ein rútur. At hyggja at rútinum er lítið áhugavert. Tað er ikki, fyrr enn tú hyggur ígjøgnum rútin, at tú veruliga fært nyttu av honum. Onkur hevur sagt um føroyskt, at har er støðan uppaftur verri. Tað eru fólk, sum spegla sær sjálvum í rútinum, heldur enn at hyggja ígjøgnum hann, og uppaftur onnur tora ikki at hyggja ígjøgnum rútin av ótta fyri, at hann skal fáa skeinur. Tað týdningarmesta er, at tað sæst væl út.

Mál er í høvuðsheitinum líka nógv ein listagrein sum ein vísindagrein. Vanliga kendar grundreglur eru fyri bæði málninga- og tónlist, men vøkur listaverk verða eisini skapt, tá ið tær traditionellu grundreglurnar verða fluttar eitt vet, og kendir komponentar settir øðrvísi saman.

Vandamiklast er, tá ið listin verður bundin niður. Vit kenna tað frá nazistýrinum, har ávísar taktir og tónar vórðu bannað í tónleikaframførslum, ella frá Stalin-stýrinum, har bert varð loyvt at útinna myndlist og høgglist á serligan hátt, sum varð ásettur frammanundan.

Føroyskt er ogn Føroya fólks, men eins og við tí livandi tilfeinginum á føroysku landleiðunum tykist tað sum um, at ávísir samfelagsbólkar kenna sær størri rætt til hesa ogn Føroya fólks enn onnur.

Týdningarmikið er eftir mínum tykki at skilja føroyska málrøkt og føroyska málnýskipan sundur.

Málrøkt er meira ein yrkisspurningur. Eftir ávísum frammanundan ásettum reglum gert tú av, hvat ið er gott og rætt føroyskt í dag. Hesar reglur eru tó ikki altíð so avgjørdar. Tað er, sum nevnt, ofta ein listagrein – ein estetisk fatan av, hvat ið rætt er.

Málnýskipan er nakað heilt annað. Hetta er í roynd og veru ein politiskur spurningur, um vit vilja halda eina nýggja kós í málspurningum frameftir, og um vit vilja gera nakrar tillagingar ella broytingar, eitt nú viðvíkjandi nýggjum orðum, stavseting og øðrum.

Vit kunnu samanbera tað við løgfrøði og politikk. Løgfrøðin er rættiliga fastløgd í lógum v.m., sum dømt verður út frá. Politikkur er nakað heilt annað. Tað er hvørjar reglur, vit ynskja frameftir. Politikkur er ikki ein yrkisspurningur hjá løgfrøðingum at fáast við, men teir kunnu verða góðir í ráðum, tá ið politikkurin skal fastleggjast, men eiga ikki avgerðarrættin. Men treyðugt so, onkuntíð skapa løgfrøðingar løggávu, og onkuntíð døma politikarar í roynd og veru. Idealið er so í øllum førum hitt fyrra.

Ein løgtingslóg um føroyskt mál má á einhvønn hátt skapa tvey málfora. Eitt forum, sum autoritativt ger av, hvussu yvirskipaðir nýskipanarspurningar viðvíkjandi føroyskum skulu avgerast, og eitt annað forum, sum tekur sær av dagligum spurningum um, hvussu føroyska málið er í løtuni. Eitt málting og eitt málráð.

Eitt málting má eftir mínum tykki veruliga verða kjølfest í demokratinum. Hetta er ikki fyri frøðingar at gera av, men fólkslig umboð, sum eru vald, tí at hildið verður, at tey hava eitt gott máloyra. Fleiri mátar kundu verið at valt máltingið, eitt nú við beinleiðis vali, ella at løgtingið í lutfalsvali valdi tað.

Málráðið við frøðingum kundi so verið valt av máltinginum til at tikið sær av røktini av málinum í tí líki, tað er nú.

Men ein løgtingslóggáva flytir onki. Tað er fíggjarliga orkan, sum verður sett av, ið er altavgerandi. Sum er bendir tó onki á, at pengar eru tøkir á løgtingsfíggjarlógini til at fremja nakra økta málrøkt og -nýskipan fyri.

So samanumtikið haldi eg ikki, at Mentamálaráðið skal skunda sær við ætlaða løgtingslógaruppskotinum. Frægari er, at tað sleppur at liggja og sodna eitt sindur afturat. Tað, sum stendur í fyriliggjandi lógaruppskoti, kann eins væl standa í tænastuboðum til Málráðið frá Mentamálaráðnum.

Eg ivist stórliga í, hvørt tað er rætt at seta lóggávuásettar bindingar á málið, sum skylda er hjá myndugleikum og privatum at fylgja. Føroyskt er fyrst og fremst ein miðil at geva og fáa upplýsingar. Kanst tú ikki málbera teg frítt, er framsagnarfrælsi títt skert, og tann, sum tosar "rætt" hevur eina yvirvág í kjakinum. Framsagnarfrælsi hevur so stóran týdning, at fyri tí mugu øll onnur atlit víkja. Tað má farast fram við ráðgeving og tilmælum, sum fólkið í dagligari málnýtslu vrakar ella tekur til sín. Hevur onkur hug at halda sína egnu málkós, skal honum verða frítt at gera tað.